# Brandmand

Statens Luftfartsvæsen – Vága Floghavn



Til Driftstjenesten Vága Floghavn søges to medarbejdere (brandmænd).

DINE ARBEJDSOPGAVER BLIVER:

- Brand- og redningstjeneste samt søredningstjeneste.
- Mark- og vintertjeneste (snerydning, renholdelse/vedligeholdelse af arealer, bygninger og rullende/ sejlende materiel).
- Security

VI FORVENTER, AT DU:

- Har kørekort til lastvogn.
- Er indstillet på at erhverve dig den yderligere viden stillingen kræver.
- Har nemt ved at samarbejde.
- Har et rimeligt kendskab til engelsk.
- Kan bestå helbredsundersøgelse til brandmand / røgdykker

VI TILBYDER:

- Et spændende afvekslende job, med mange forskellige arbejdsopgaver.

Ansættelsen vil ske på tjenestemandslignende vilkår med aflønning efter lønramme 10, hvor lønnen udgør kr 201.642 pr år. Hertil kommer et tillæg på kr. 17.543,53 pr år. Pr måned udgør lønnen således kr. 18.265,49. Herudover indbetales der 15% af den pensionsgivende løn til en pensionsordning.

YDERLIGERE OPLYSNINGER:

Har du behov for yderligere oplysninger, kan du kontakte lufthavnsforvalter Jóannes Ortind telefon 354410 / 354400 eller på e-mail joor @ slv.dk

Skriftlig ansøgning indsendes til:
Statens Luftfartsvæsen,
Vága Floghavn FO-380 Sørvágur.

Vi skal have din ansøgning senest mandag den 29. juli 2002. Mærk ansøgningen (Ansøgning VD)

Du er også velkommen at besøge vores hjemmeside på internettet. Adressen er www.slv.dk/vagar

SLV ønsker en medarbejdersammensætning, der afspejler det omgivende samfund. Vi opfordrer derfor kvinder og mænd i alle aldre, uanset etnisk baggrund, til at søge.

Trafikministeriet

Statens Luftfartsvæsen (SLV) er en statsvirksomhed under Trafikministeriet. I SLV arbejder ca. 250 mennesker med at skabe sikkerhed og effektivitet foer den civile luftfart i Danmark

Statens Luftfartsvæsen
Vi holder Danmark på vingerne

---

# POLITIIÐ Í TÓRSHAVN og FÚTASKRIVSTOVAN

## felags telefonnummar

Politistøðin í Tórshavn og Fútaskrivstovan hava fingið felags telefonnummar.

Nýggja nummarið er:

**35 14 48**

Samstundis eisini nýggj telefax nummur

**Politistøðin telefax 35 14 49**
**Fútaskrivstovan telefax 35 14 52**

Fyrstu tíðina vegleiðir ein telefonsvarari, um tygum av óvart hava ringt til gomlu numrini.

l.v.
Uni Vestureið
politiinspektørur

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í Útibarnagarðinum Spíranum.

**Stovnslýsing**
Í Spíranum ganga 20 børn í aldrinum 5-6 ár. Barnagarðurin liggur væl fyri í barnavinarligum og náttúruríkum umhvørvi. Dentur verður lagdur á, at nýta mest møguliga tíð úti í náttúruni. Árstíðirnar seta sjálvsagt sín dám á gerandisdagin, og hava tær ymiskar møguleikar og avbjóðingar við sær.

**Starvið**
gevur tær møguleika at arbeiða í einum fjølbroyttum og øðrvísi umhvørvi. Í tøttum samstarvið við starvsfelagar og foreldur, verður tú við til at gera gerandisdagin hjá børnunum stuttligan, mennandi og læruríkan.

Tú fært møguleika at seta tín dám á stovnin. Dentur verður lagdur á sjálvstøðugt arbeiði, har tú dugir at síggja møguleikar heldur enn forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 12. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið. Um pedagogur ikki søkir starvið, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigrun Davidsen, leiðara, á tlf. 228070, ella Katrina Petersen, samskipara, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera Útibarnagarðinum Spíranum, c/o Føroya Ríðingafelag, Havnardalur, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 26. juli 2002.

SNARSKIVAN

---

# Vit keypa ull

Í viku 30 taka vit ímóti ull, í smiðjuni í Gøtudali (guli bygningurin, við vegamótið til Leirvíks bergholið). Vit keypa ull frá kl. 13.00 - 17.00, frá mánadegnum 22-7 t.o.v. fríggjadagin 26.-7-02.

Latið verður:
3 kr/kg fyri gráa og óskildað ull.
8 kr/kg fyri myrka morreyða og hvíta ull.
10 kr/kg fyri ljósa morreyða ull.

Í umbýtið við ullina, verður ein tilgóðarseðil útflýggjaður, keypast kann á Snælduni fyri tilgóðarseðilin.

**P/F Snældan**
490 Strendur
Tel. 447154

---

## Arbeiðseftirlitið
*Occupational Safety and Health Administration*

# Summarfrí

Frá týsdegnum 30. juli til fríggjadagin 9. august er Arbeiðseftirlitið stongt vegna summarfrí.

Falkavegur 6
P.O. Box 1134
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tlf. +298 317811
Fax +298 314489
www.arb.fo
arb@arb.fo

---

## LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður ongin avgreiðsla í Løgmansskrivstovuni/Løgmálaráðnum frá 22. juli til 4. august 2002.

Átrokandi boð kunnu sendast á telduposti info@tinganes.fo ella á telefax nr. 351015.

Telefonsvararin sigur eisini frá hvørji telefonnummar ber til at ringja til, um hetta gerst neyðugt.

**Løgmansskrivstovan**
**Løgmálaráðið**

---

# Summarfrí

22. juli - 9. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 22. juli til fríggjadagin 9. august, báðir dagar íroknaðir.
Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10.00 - 12.00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við Barsilsskipanina um telefax ella teldupost.

**Barsilsskipanin**

Barsilsskipanin · Smyrilsvegur 20 · 100 Tórshavn
Tel 35 35 55 · Fax 35 35 56 · barsil@barsil.fo
www.barsil.fo





# Skrivstovufólk

Orsakað av vaksandi virksemi verður søkt eftir fólki at hjálpa okkum í bókhaldinum. Talan er um eitt hálvtíðar starv (arbeiðstíðin kann avtalast).

**Starvið**
Arbeiðsuppgávan verður í høvuðsheitum:
Alt vanligt skrivstovuarbeiði, tó er ætlanin at tú serliga skal taka tær av tollavgreiðslu og fakturering.

**Umsøkjarin**
Vit vænta at tú hevur skrivstovuútbúgving ella hollan kunnleika innan bókhald.
Kunnleika til tollavgreiðslur.
Ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni og ert røkin.
Kunnleiki innan HVS er ein fyrimunur (tó eingin treyt).

Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsing um royndir og útbúgving skal sendast til P/F Demich, Postboks 378, FO-110 Tórshavn, skjótast til ber ella í seinasta lagi 22. juli 2002.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torbjørn Hansen ella Jan Günther á telefon 311071.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

---

**Mentamálaráðið**
*Mentamáladeildin*

# Fulltrúi í Mentamálaráðnum

Í Mentamáladeildini er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja.

Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild. Harumframt er ein stápsdeild við løg- og búskaparfrøðingum. Í Mentamáladeildini starvast, umframt deildarstjóran, tveir fulltrúar, ein ráðgevi og ein skrivari.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- At fyrisita, tryggja menning og samstarv og røkja samskifti við teir mentanar- og granskingarstovnar, ið eru undir Mentamáladeildini og taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At røkja samskifti við mentanarlívið og málsviðgerð hesum viðvíkjandi
- At umsita ymsar stuðulsjáttanir
- At arbeiða við mentanarpolitiskum verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a., kunna um stuðulsmøguleikar v.m.
- At umsita virkisøki, sum verða løgd til fulltrúan
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur.

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvar við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:

- Hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- Vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevnir
- Hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2002, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, t-post: joannes@mms.fo, tlf. 355050 og fartlf. 21 50 52 ella Petur Petersen, aðalstjóra, t-post: peturp@mms.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild.
**Mentamáladeildin** hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, mentamálum, gransking, søvnum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.

---

Til **Hvannasunds Kommunalu Dagrøktarskipan**
verður við hesum søkt eftir:

# leiðara

at byrja 15. august 2002 ella skjótast gjørligt.

Talan er um **hálvtíðarstarv**.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan millum FKA og Føroya Pedagogfelag.

**Fleiri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Eliasen, kommunuskrivara, á telefon 226360.

**Umsóknir** verða at senda til:
Hvannasunds Kommunu
740 Hvannasund

og skulu vera kommununi í hendi **í seinasta lagi 5. august 2002.**

**Hvannasunds Kommuna**

Vegna feriu verður kommunuskrivstovan stongd frá 15. juli til 12. august 2002.

---

# HMP CONSULT

Søkir *verkfrøðing* og *byggifrøðing* at byrja beinanvegin, ella so skjótt til ber.

Virkisøkið er projekterings- og eftirlitsuppgávur innan bygging, vegagerð og anleggsarbeiði.

Kunnleiki til AutoCad er ein treyt.

Vit kunnu bjóða góða løn og góð og mennandi arbeiðsviðurskifti, har arbeitt verður við tí nýggjastu tøkniini innan virkisøkið.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum nakrar reglur um teg sjálva/sjálvan.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja á tlf. 312279 og spyrja eftir Una ella Hans.

**HMP Consult, ráðg. verkfrøðingar**
Heygsvegur 56
FO-100 Tórshavn
Teldupostur: hmp@hmp-consult.com

---




**lack ir s l an er ko in**
**o er a a esu s u**

**3 -arin • H. C. W. Tórgarð • Statoil í Gundadali • Baslev, Byggibúðin. • Statoilstøðin á Argjun • Kiosk Vár í Runavík • Leikalund í Klaksvík og í Tangabúðini á Tvøroyri**

PH. 02